# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800




*Venjingarvøllurin hjá føroyska landsliðnum í Kaunas er ikki av bestu grasvøllum, sum spælararnir hava roynt seg á*

# Líkist einum plássi til Troest

**Verjan er framvegis opni spurningurin á landsliðnum. Men tað bendir á, at tað eru Atli Danielsen, Jákup á Borg og Símun Samuelsen, sum mugu bíða eftir seinastu meldingunum um Jón Róa Jacobsen**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er planur B, sum er á skránni til venjingarnar hjá føroyska landsliðnum í Kaunas. Tað verður ikki fyrr enn í evstu løtu, at tað verður tikin endalig støða til, um Jón Rói Jacobsen fer at spæla, og hetta hevur eisini merkt venjingarnar hjá liðnum.

Og hesar benda á, at Føroyar fáa ein nýggjan A-landsliðsspælara mikukvøldið. Johan Troest Davidsen hevði ikki verið í hópinum, fyrr enn hesaferð, og longu á tíðindafundinum gav Jógvan Martin Olsen til kennar, at tað var væl hugsandi, at nýggi maðurin fekk spælitíð.

Og hendan verður eftir øllum at døma á vinstra bakki. Soleiðis, sum verjan varð sett saman til venjingarnar, verða tað Atli Danielsen og Fróði Benjaminsen, sum røkja miðverjusessirnar, meðan Jákup á Borg spælir høgri bakkur. Verður Jón Rói Jacobsen tøkur, er lættasta loysnin helst at flyta Atla í høgra borð og Jákup niðan á vanda miðvallarplássið. Verður tað gjørt, so merkir hetta eisini, at Símun Samuelsen má út á beinkin at sita.

- Sum er, so fær Jón Rói ikki tikið lut í venjingunum, og tí mugu vit fyrireika okkum upp á tann møguleikan, at hann heldur ikki spælir mikukvøldið. Men vit vóna, at hann er tøkur. Hann vandi nakrar stabilitetsvenjingar í morgun (mánamorgunin, blðm.), og nú seinnapartin er hann á súkklu, meðan hinir venja. So vit mugu bara síggja tíðina an, sigur Jógvan Martin Olsen.

- Og tað ávirkar so sjálvandi eisini samansetingina longur frammi á vøllinum. Tí í løtuni er spurningurin har so, hvørt Jákup skal spæla á bakkinum ella longur uppi á vøllinum.

Júst tann spurningurin man tó vera einasta ivamálið, tá liðið skal setast saman frameftir. Á sentrala miðvøllinum verða tað uttan iva Mikkjal Thomassen og Súni Olsen, ið fara at spæla, meðan Christian Høgni Jacobsen verður ytstur í vinstru. Og so verða tað Rógvi Jacobsen og Christian Lamhauge Holst, ið fara at manna álopsplássini.

### Mugu tora

Tá tosað verður um avbjóðingina mikudagin hevur landsliðsvenjarin fyrst og fremst hug at seta fokus á føroyska spælið. Sjálvandi eru sjónbandaupptøkur og tilhoyrandi analysur gjørdar av mótstøðuliðinum, men meira enn hetta er fokus vent móti føroyska spælinum.

- Tað er jú sagt ofta, men tað, sum er so øgiliga umráðandi hjá okkum, er, at vit tora at spæla. At vit fáa mótstøðumenninar at hugsa í verjustøðu. Gera vit ikki tað, so fáa kantarnir hjá hinum aloftast somikið gott pláss niðaneftir, at teir í veruleikanum virka sum eyka áleyparar.

- Megna vit hinvegin at spæla forbíð fremstu ketuna hjá teimum. Soleiðis at teir eisini noyðast at venda heimeftir. Og soleiðis at teir eisini mugu hugsa í verjustøðu, verður spælið hjá okkum nógv lættari.

## Venjingarstøðan passar væl

Soleiðis sum føroyska fótbóltskappingin er skipað, so hava trupulleikar ofta verið, tá dystir skulu spælast heilt tíðliga á árinum.

Hinvegin er ein landsdystur í september mánaði væl nakað nær tí optimala hjá einum landsliðsvenjara. Men júst hesa sannroynd vil Jógvan Martin Olsen ikki treytaleyst skriva undir uppá. Heldur ikki, hóast júst arbeiðið við venjingarstøðuni hjá spælarunum hevur staðið ovarlaga á skránni seinnu árini. Ikki minst ígjøgnum samstarvið við Magna Mohr, sum er fysiskur venjari.

- Tú skuldi jú hildið, at hetta var optimalt hjá okkum, men tað hevur tað so ikki altíð verið. Ofta hevur tað heldur verið hinvegin, at føroyskir spælarar hava havt eina niðurgongd í forminum í august mánaði. Men tosar tú um liðið í dag, so haldi eg kortini, at menn tykjast at vera væl fyri. Nú kenni eg so ikki úrslitið av teimum royndum, sum Magni gjørdi við spælarunum í dag, men teimum hyggja vit so sjálvandi eisini eftir. Og vónandi vísa tær so, at venjingarstøðan hjá flestu spælarunum er nøktandi, sigur Jógvan Martin Olsen.

**-mørk**